# Greta Hansen 90 ár

Í dag, mánadagin 7. januar, fyllir Margretha Hansen á Roykheyggi í Saltnesi 90 ár. Føðingardagin heldur hon í sambýlinum Vesturskin á Toftum, har øll eru hjartaliga væl komin frá klokkan 18 í kvøld.

Greta er ættað úr Leirvík. Foreldrini vóru Josefina og Elias Eliassen. Barnaheimið var á Toftanesi. Søgurnar og lagnurnar hjá mongum, sum settu búgv í Føroyum fyri hundrað árum síðani ella so, vóru ofta eyðkendar av sjúku og deyða, sum stóðust av sovornum, sum nú á døgum als ikki nýtist at vera orsøk til deyða.



Familjan hjá Gretu var einki undantak í so máta. Pápin doyði av lungnabruna, tá ið Greta var lítil smágenta. Josefina sat eftir við fimm børnum, og okkurt eldri fólkið var eisini í húsinum. Sjálvandi var tað stríggið, men tey komu undan.

Kristian Karl var elstur av børnunum. Hann búsettist í Runavík, men hann doyði longu sum 33 ára gamal av blindtarmsbruna. Jógvan Eli yvirtók barnaheimið á Toftanesi. Hansina og Lina giftust við útróðrarmonnum í Leirvík – ávikavíst Ingvardi Joensen og Peturi á Regni. Umframt Gretu er Lina framvegis á lívi. Hpn býr á Ellisheiminum í Runavík.

Greta giftist í 1951 við Eliesari Hansen á Roykheyggi. Sum navnið sigur, so var hann av Roykheyggi. Tá ið Eliesar var átta ára gamalur, misti hann pápan, sum doyði av lungnabruna. Hann fór tá til Leirvíkar, har hann var hjá einari mostur, inntil hann var 16 ára gamal. Tá fór hann út aftur á Roykheyggj, og tað var har, hann og Greta bygdu.

Eliesar var skipsmaður øll síni bestu ár. Hann sigldi eitt nú við Mjóvanesi, Høganesi og Vesturvík, og síðsta skipið, sum hann var við, áðrenn hann í 1980 legðist uppi, var Jógvan Norðri. Millum skipararnar, sum Eliesar sigldi við, vóru beiggin, Dia á Roykheyggi, og bróðursonurin Petur á Roykheyggi. Eliesar átti maskinbátin Roykheyggj, og í 1959 var hann saman við trimum øðrum í Holsteinsborg og róði út. Tá ið Eliesar gavst á sjónum, var hann 64 ára gamal. Hann doyði 12. apríl í 1995, og tá hevði hann í fleiri enn tíggju ár sitið á Ellisheiminum í Runavík.

Greta og Eliesar fingu tvær døtrar. Helena býr í Havn, og Eyðhild og maður hennara, Ronnie Lindholm, búgva dygst innanfyri Roykheygg. Greta eigur fimm ommubørn og trý langommubørn.

Sum hjá flestu øðrum fiskimannakonum var luturin hjá Gretu at vera heima hjá børnunum. Eftir at flakavirkið Nykur var komið á Toftum, fóru fleiri av tilkomnu konunum á plássinum at arbeiða í fiski. Í mai í 1976 fór Greta at arbeiða á Nyki, og har var hon inntil í 1991. Henni dámdi sera væl at arbeiða á Nyki.

Hóast hon í dag fyllir 90 ár, so er Greta framvegis byrg. Hon hevur gott skil, og hon fylgir væl við. Alla sína tíð vóru Greta og Eliesar trúføst í salinum á Toftum. Greta er framvegis regluliga í salinum. Eftir eitt langt lív gleðist hon í vónini um, at tað besta er fyri framman hjá øllum teimum, sum hava sett sítt álit á Harran Jesus.

Vit ynskja Gretu hjartaliga tillukku og heilsa henni og hennara á stóra degnum í dag.

**J**

## Minningarorð um beiggja mín

# Pól í Líð

Ikki hevði eg droymt um, at eg skuldi skriva minningarorð um beiggja mín Pól.

Gekk og stákaðist uttan fyri suðuri í Vági, tá Sigmund ringdi til mín og spurdi um eg hevði frætt úr Leirvík. Hoyrdi á málinum at her var ikki rætt, (hugsaði um mammu beinanvegin). So fullu orðini: "pápi er deyður"! - tá steðgaði alt upp.

Ja, tað var ótrúligt, leggja seg at sova um kvøldið eftir dagsins strev og uttan nakran bardaga ella nakað ikki at vakna aftur.

Havi havt góðar stundir at hugsað um alt hetta nú eg havi verið burtur um jólini og tað kundi verið nógv at trivi í.

Vit hava sum brøður havt nógv saman, bæði burtur og heima. Tað er og verður ein stórur saknur, nú hann ikki kemur inn á gólvið meira, ja tað gretti ikki, tá eg kom aftur at húsum um tað var av skipið ella úr suðri, so var hann tann fyrsti at støkka inn á gólvið.

Hann var ógvuliga góður við sítt og síni, altíð klárur at hjálpa har hann kundi og geva. Havi manga hýsina fingið frá honum, síðani eg sjálvur gavst at fiska.

Nú tað bar til at hava samband við Sigmund yvir i netið, har vit kunnu samskift bæði við orðum og myndum, heilt norð á 80 stig, tá kom Pól ofta yvir á gólvið, at vita um eg ikki kundi ringja upp til hann. Hettar fyri at frætta og fortelja honum nýggjheitir, ja tosaði hann um et keypa sær eina teldu, men tað verður ikki nú.

Eisini dámdi honum væl at prýða til jólar, (ja onkur helt í so nógv) men hesi jólini var myrkt inni í Líð, nei ikki var tað betri.

Jú tað er saknur í nú ein stund er fráliðin og tað er sodna eitt sindur. Stórstur er saknurin hjá tær Erikka og børn og abbabørnini, sum hann var so ógvuliga góður við.

Saknur er at koma aftur í Líðina, og hann ikki støkkur inn á gólvið meir.

Friður verður yvir minninum um beiggja mín Pól ì Líð.

**Chr. Oluf**

**Dagurin**
**8. januar. Erhardus ella Erhardt.** Írskur munkur, sum doyði um ár 700. Ella kanska er talan um ein týskan biskup, sum fyri undurgerðir sínar verður skírdur halgimenni. Týskt navn, samansett av æra og harður.

# Realskúlaflokkur



Her er ein mynd frá realskúlaframsýningini í Kommunuskúlanum, sum Jórun Dánjalsdóttir skipaði fyri í summar. Myndin er tikin framman fyri gomlu fimleikahøllina og er av einum realskúlaflokki skúlaárið 1950/51.

**Aftasta rað f.v.:** John Nolsøe, Kirstin Bech, Gunnvá Jacobsen, Jógvan við Ánna, lærari, Marius Thomasen og Poul Olsen

**Miðraðið f.v.:** Marjun Weihe, Tórhild Petersen, Alma Brend, Jonna Jensen og Jógvan A. Joensen

**Fremsta rað (niðast á myndini) f.v.:** Kirstin Rein, Regin Thomsen og Unn Niclasen

*Myndaeigari: Marita Arge Magnussen*

Lesið Sosialin